## Alphabeat mistu nýggjar sangir

Danski poppbólkurin Alphabeat er rættiliga á veg í Onglandi, har tónleikararnir nú hava búsett seg. Um vikuskiftið var bólkurin heima í Danmark fyri at taka ímóti eini virðisløn á Zulu Awards. Tá ið tónleikararnir komu aftur til London, fingu tey eina keðiliga móttøku. Tjóvar høvdu brotið inn í íbúðina hjá teimum, og teir vóru millum annað farnir avstað við einari teldu, har bólkurin goymdi nýggjar sangir. - Vit hava mist umleið helvtina av okkara nýggja tilfari. Vit royna at minnast sangirnar, so frætt sum vit kunnu, og so royna vit at spæla teir inn av nýggjum, sigur tónleikarin Rasmus Nagel við Se & Hør. Alphabeat, sum skal spæla á Summar Festivalinum í august, arbeiðir í løtuni við nýggjari fløgu, og tey kundu í vikuni fegnast um, at sangurin Fascination hevur vunnið inn á bretska hitlistan.

## Fimtan listafólk á Várframsýningini

Várframsýningin 2008 umboðar nøkur av okkara vælkendu listafólkum, umframt nýggjar spennandi spírar, sum vit vantandi fara at síggja meira til seinni. Várframsýningin er ætlað til at vísa tað besta, sum føroysk myndlistafólk fáa frá hondum. Men samstundis, at geva "tilkomandi" myndlistafólki ein møguleika at sýna fram verk síni, siga Føroysk Myndlistafólk í tíðindaskrivi. Várframsýningin letur upp í morgin kl. 17. Várframsýningin er ein sensurerað framsýning. Ein trímannanevnd velur tað besta burturúr. Í sensurnevndini sita Eli Smith, Øssur Mohr og Eyðun av Reyni. Várframsýningin er framsýningin hjá felagnum Føroysk Myndlistafólk. Í ár hava 22 fólk sent 110 verk inn til framsýningina, og sensurnevndin hevur latið 15 fólk koma gjøgnum nálareyga við tilsamans 58 verkum.

# Kann ikki lata vera við at koyra ov skjótt

**Heilar fimm ferðir er ein bilførari tikin fyri at koyra ov skjótt og tað skal kosta. Tí vildi ákærin hava Landsrættin at staðfesta, at oftari ein koyrir ov skjótt, harðari skal revsingin verða**



*Ein maður, sum ikki kann lata vera við koyra ov skjótt, noyðist nú at lata bilin standa í hálvt triðja ár. Boðini eru, at vit góðtaka ikki, at bilførarar koyra ov skjótt og at tað skal kosta at koyra ov skjótt fleiri ferðir*

FERÐSLUTRYGD

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tann, sum ikki kann lata vera við at trýsta á speedaran, má eisini vera til reiðar at betala fyri tað.

Tað má ein maður ásanna eftir at var í landsrættinum í gjár.

Talan er um ein bilførara, sum eftir øllum at døma ikki kann lata vera við at koyra ov skjótt, sum tikið var til í rættinum.

Heilar fimm ferðir hesi síðstu fýra árini er hann tikin fyri at koyra ov skjótt, bæði í bygdum og í óbygdum øki.

Í øllum førum hevur hann koyrt skjótari enn 30 kilometrar meiri um tíman enn loyvt er og tað merkir, at hann dómurin hevði verið ein treytað frádøming av koyrikortinum. Tað merkir so, at hann skal taka koyrikortið av nýggjum.

### Tríggjar dómar í eitt ár

Í januar í 2004 varð maðurin tikin fyri at koyra 83 kilometrar um tíman í bygdum øki, har tað er loyvt at koyra 50.

Tað kostaði honum eina treytaða frádøming.

Men longu í september sama ár, áðrenn royndartíðin var av, varð hann aftur tikin. Hesuferð koyrdi hann 122 kilometrar um tíman í óbygdum øki.

Tá ið hann var fyri í rættinum, fekk hann eina felags revsing fyri hesi bæði lógarbrotini og tað endaði við, at hann misti koyrikortið í eitt hálvt ár.

Men tað hjálpti ikki nógv, tí longu í januar í 2005, var hann aftur tikin fyri at koyra ov skjótt og hesuferð koyrdi hann 97 kilometrar í bygdum øki.

Aftur tá mátti hann einaferð enn í rættin og tá misti hann koyrikortið í eitt ár.

### Tvær ferðir í tríggjar mánaðir

Nú var so friður til í fjør.

Men tá var hann so aftur tikin tvær ferðir upp á tríggjar mánaðir fyri at koyra ov skjótt í óbygdum øki.

Í tí eina førinum koyrdi hann 113 kilometrar um tíman og í hinum førinum koyrdi hann 111 kilometrar um tíman.

Fyri hesi bæði brotini dømdi Føroya Rættur mannin at missa koyrikortið í hálvtannað ár.

Men ákæruvaldið helt, at tað var so bíliga sloppið, at dómurin varð skotin inn fyri Landsrættin.

Fyri Fútan er talan um eitt prinsippmál, tí hetta er fyrstu ferð, at nakar er tikin so ofta fyri at koyra ov skjótt.

Hetta er fimtu ferð, at hann koyrir so skjótt, at hann eigur at fáa eina treytaða frádøming.

Men tey bæði brotini í fjør vóru við so stuttum millumbili, at talan er um sama dóm.

Men saman við teimum trimum dómunum frá 2004 og 2005, er tann seinasti dómurin í fjør sostatt fjórði dómurin hann fer fyri at koyra ov skjótt.

Tí kravdi fútin, at maðurin varð dømdur at missa koyrikortið í nógv longri enn hálvt annað ár og sjálvur helt hann, at ein frádøming í fýra ár er hóskandi.

- Prinsippið er, at revsingin skal verða harðari og harðari fyri hvørja ferð, ein verður tikin fyri at koyra ov skjótt. Og skal nakar samanhangur verða í, er tað ov lætt sloppið bara at missa koyrikortið í hálvtannað ár.

Tí vildi fútin hava Landsrættin at siga sína hugsan, so at vit vita, hvussu revsingin í framtíðini skal vera í slíkum førum.

Hann helt, at signalvirðið í dóminum mátti vera, at vit finna okkum rætt og slætt ikki í, at bilførarar koyra ov skjótt

Verjin hjá manninum helt, at hálvtannað ár var nóg hørð revsing, tí hann vísti á, at talan var ikki um skilaleysa koyring sum so, tó at ongin ivi var um, at hann hevði koyrt ov skjótt.

Landsrætturin er samdur í, at tað er ov lítið at missa koyrikortið í hálvt annað ár.

### Harðari revsing

Landsrætturin staðfestir, at fyri at hava fýra dómar fyri at koyra ov skjótt, er tað ov bíliga sloppið at missa koyrikortið í hálvtannað ár.

Landsrætturin legði dent á, at í fjør varð hann tvær ferðir tikin við eini ferð, sum hvør sær hevði ført við sær, at hann fekk eina treytaða frádøming og sostatt mátti taka koyrikortið av nýggjum.

Revsingin fyri hvørt av brotunum hevði verið at mist koyrikortið í hálvtannað ár og verður tað faldað við tvey, skuldi hann mist koyrikortið í trý ár.

Landsrætturin gjørdi tó av at geva manninum ein avsláttur upp á eitt hálvt ár.

Sostatt var endaliga úrslitið, at maðurin misti koyrikortið í tvey og eitt hálvt ár.

Fútin er nøgdur við, at tað nú er endaliga staðfest, at tað skal kosta, at koyra ov skjótt ferð eftir ferð.